## DAGSINS MEINING

# Pensiónsmálið á rætta kós

Tað var eitt stórt mistak, at vit her í Føroyum ikki, tá rætta stundin var, t.v.s fyri trýati árum síðan, fingu skipað pensiónviðurskiftini eins og gjørt varð í okkara grannalondum.. Í Íslandi varð  t.d. við lóg álagt øllum løntakarum at rinda ávísan prosentpart av lønini í pensiónsgrunn. Eisini varð álagt arbeiðsgevarum at rinda til skipanna. Løntakarin eigur so hesa pensión uttan mun til, hvat annars hendir. Á hendan hátt vóru ómetaliga stórar upphæddir savnaðar í pensiónsgrunnum í Íslandiog annars í øllum Norðanlondum uttan í Føroyum. Vit valdu Samhaldsfasta, tí vit kundu ikki semjast um sama model, sum grannar okkara nýttu.

Grundleggjandi hugmyndin við samhaldsfasta er góð, fortreytirnar vóru bara ov veikar frá fyrsta degi av. Alt ov lítið kom og kemur í grunnin og løntakarin eigur ikki sína pensión. Rentan er mestsum eingin. Tað skal eitt nógv hækkað gjald frá hvørjum einstøkum løntakara til, um her veruliga skal verða talan um tað ískoytið til fólkapensiónina, sum vanligi løntakarin uttan pensiónskipan skal fá gleði av.

Í grannalondum okkara eru tað pensiónsgrunnarnir, ið fíggja tær stóru íløgurnar á privata arbeiðsmarknaðinum. Her eru eingi grunnar, tí vit valdu teir frá í sjeyti- og áttatiárunum. Fakfeløgini, tey flestu settust hendur í favn at bíða eftir tí almenna. Hetta var ikki klókur politikkur. Vit fingu LÍV og Samhaldsfasta, sum ikki kunnu samanberast við pensiónsgrunnar í okkara grannalondum. Nú má svíða sum svøllur. Tey vælbjargaðu fakfeløgini hava langt síðan tryggjað limum sínum pensiónskipanir gjøgnum LÍV ella umvegis danskar pensiónsgrunnar. Hesar skipanir kunnu tó ikki javnmetast við tær í okkara grannalondum. Tey minni vælbjargaðu feløgini og teirra limir eru við sviðið soð. Her má nakað munagott henda skjótt. Nú vendist ikki aftur frá Samahaldsfasta og satsast má uppá hendan grunn, hóast hann ikki er verðins smartasta uppfinning. Inngjaldið má økjast heilt munandi, so tey, sum ikki eru limir hjá teimum vælbjargaðu fakfeløgunum, eisini trygt kunnu síggja aldurdómin í eyguni. Pensiónsmálið má nú fáast á rætta kós.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Spurningur til  Formann Búskaparráðsins

**Johan Dahl**
*Løgtingsmaður*



Nú kunngjørt hevur verið alment at formaðurin leggur frá sær , tá árið er av, loyvi eg mær at seta hesar spurningar:

**1.**
Metir Formaðurin, at nevndin hevur gjørt sítt arbeiðið samb. ásetingini í løgtingslógini um Búskaparráðið og hvat arbeiðssetningurin er?

Í nevndu løgtingslóg - LØGTINGSLÓG NR. 120 FRÁ 12. JULI 1995 UM BÚSKAPARRÁÐ, SUM BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 74 FRÁ 20. MAI 1996 - verður millum annað sagt í grein 3 stk. 2

soljóðandi:
**§ 3.1)** Búskaparráðið kemur saman minst tvær ferðir um árið eftir avgerð formansins ella eftir áheitan frá 4 limum í ráðnum.
**Stk. 2. Eftir umrøðu í ráðnum gera búskaparfrøðingarnir minst eina ferð um árið frágreiðing um gongdina í føroyska búskapinum, har mett verður um búskaparligu støðuna, útlitini framyvir, og hvørji tiltøk eiga at verða framd. Búskaparfrøðingarnir kunnu saman við frágreiðingini geva ein samandrátt av limanna sjónarmiðum, sum koma fram í umrøðuni. Búskaparfrøðingarnir hava ábyrgdina av frágreiðingini.**

**2.** Heldur formaðurin at tað er í lagi, at nevndin enn ikki er komin við hesi frágreiðing og samandrátti av limanna sjónarmiðum, og ætlar Búskaparráðið sær ikki at gera hesa frágreiðing áðrenn árið er at enda?

**3.** Um nevndin IKKI ætlar sær at koma við lógarásettu frágreiðing - metir formaðurin so ikki, at nevndin hevur fingið ov nógva nevndarsamsýning?

Við vón um greitt svar.

# Fundarsamtykt frá landsfundi Sjálvstýrisfloksins

*- í Klaksvík 29.10.2005*

Sjálvstýrisflokkurin tekur frástøðu frá ætlanum samgongunnar at leggja seg út í arbeiðsstøðg og lóggeva einum parti av limunum í einum fagfelag aftur til arbeiðis. Hetta má vera eindømi og skapar ikki álit millum partarnar. Slíkar ósemjur mugu loysast á annan hátt.

Ætlaði skattalættin á 60 milliónir krónur um árið, sum samgongan hevur fráboðað, er nú vorðin til ein óvirðiligan innanhýsis sjónleik í samgonguni, hvørt talan er um skattalætta ella afturbering til kommunurnar. Eisini er tað átaluvert, at tað er Samhaldsfasti, sum skal gjalda.

Sjálvstýrisflokkurin vil arbeiða fyri, at øll ung skulu fáa ta útbúgving, tey sjálvi velja. Útbúgving er ein tann týdningarmesta íløgan í okkara samfelag og er at meta sum lykilin til framburð.

Menningin kring landið skal tryggjast, so stovnar, ið skapa førleikakrevjandi arbeiðspláss, verða í øllum økjum í landinum.

Sjálvstýrisflokkurin er av teirri áskoðan, at vit í størri mun skulu gagnnýta varandi orkukeldur. Tað almenna eigur at seta sær sum mál, at innan 2015 skal 50% av orkunýtsluni í øllum almennum bygningum koma frá varandi orkukeldum.

Sjálvstýrisflokkurin staðfestir, at fiskiríkidømið er ogn Føroya fólks. Hetta ríkidømið skal í størri mun koma Føroya fólki til góðar.

Einskiljing av almennum fyritøkum eigur at verða framd á einum tryggum grundarlagi og við skynsemi, soleiðis at sum mest fæst burturúr.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax  341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.